UTTAN ÚR HEIMI

# Hjálparfólk koyrd úr Norðurkorea

**Útlendskir eygleiðarar siga, at ein triðingur av fólkinum hava ov lítið til matna, men norðurkoreonsku myndugleikarnir siga, at eingin líður neyð longur, og at landið hevur ikki tørv á útlendskum hjálparfólki longur**

NORÐURKOREA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



*Norðurkorea sigur seg ikki hava brúk fyri vesturlendskum hjálparfólki, men eygleiðarar halda avgerðina vera politiska*

Kommunistastýrið í Pyongyang hevur kunngjørt, at tað megnar at loysa allar uppgávur sjálvt, og ti skulu allir útlendskir hjálparfelagsskapir gevast við arbeiði sínum har á nýggjárinum. Tey útlendsku hjálparfólkini, sum hava býtt matvørur út til fólk, hava fingið tvinnar kostir í at velja. Annaðhvørt fara tey undir annað arbeiði, ella mugu tey fara av landinum.

ST-matvørustovnurin WFP sigur, at umleið átta milliónir fólk ella ein triðingur av fólkinum í Norðurkorea hava ov lítið til matna. Fyri tíggju árum síðani varð landið rakt av ringari hungursneyð, sum eftir øllum at døma kravdi meiri enn tvær milliónir mannalív, og tey seinastu árini hava altjóða felagsskapir givið umleið seks milliónum norðurkoreanum mat.

Eysturríkski professarin Rudiger Frank, sum kennir Norðurkorea sera væl, sigur við týska blaðið Frankfurter Allgemeine Zeitung, at eftir hansara tykki er norðurkoreanska stjórnin komin til ta niðurstøðu, at tann politiski kostnaðurin av teirri útlendsku hjálpini er størri enn tað gagn, sum fólkið fær burtur úr henni. Við øðrum orðum verða tey vesturlendsku hjálparfólkini roknað sum møguligir njósnarar, og tí vil landið heldur hava hjálp úr Kina og Suðurkorea, men framvegis undir strongum eftirliti.

Aftan á nýggjár verða tað aftur hermenn og norðurkoreonsk hjálparfólk, sum fara at geva fólki mat, og endamálið við tí er at vísa fólkinum, at tað eru norðurkoreanar sjálvir, sum metta fólkið.

Eygleiðarar vestanfyri halda, at norðurkoreanska avgerðin kann hava sam-band við, at bæði ST og ES funnust hvassliga at landinum fyrr í ár. Í einari ES-frágreiðing stóð millum annað, at Norðurkorea brýtur mannarættindini, og at myndugleikarnir áttu at geva útlendskum hjálparfólki lættari atgongd til landið. Men atfinningarnar raktu eftir øllum at døma meint í Pyongyang, og nú kom svarið, skrivar Frankfurter Allgemeine Zeitung.

# Rúmdin næsta ár

**Himmalhválvið fer at vísa okkum ymiskt áhugavert í tí nýggja árinum, men tó einki nýtt**

RÚMDIN
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*



*Vit fáa eina lutvísa sólarmyrking í 2006*

Tað mest sjónliga verður ivaleyst ein lutvís sólarmyrking. Harafturat fáa vit nakrar mánamyrkingar, men tær verða ikki fullar, og at enda verður gongustjørnan Venus ljósari enn vanligt tað mesta av árinum.

Sólarmyrkingin byrjar stutt fyri klokkan ellivu tann 29. mars og endar stutt fyri klokkan eitt. Serfrøðingarnir siga, at myrkingin verður av tí mesta stutt fyri klokkan tólv, og tá fer mánin at fjala umleið ein fjórðing av sólarflatuni. Longu nú verður sagt, at tey, sum ætla sær at eygleiða fyribrigdið, skulu fáa sær okkurt at verja eyguni við.

## Mladic fær pensjón

Serbiska útvarpið B92 hevur nú avdúkað, at fyrrverandi generalurin Ratko Mladic hevur fingið pensjón úr serbiska ríkiskassanum, sjálvt um krígsbrotsmannadómstólurin hevur ákært hann fyri grov krígsbrotsverk undir borgarakrígnum á Balkan í nítiárunum. Sambært útvarpinum fekk hann pensjón so seint sum í november.

ST hevur kravt, at Serbia skal taka Mladic og senda hann til Haag, sum hann kann koma fyri rættin har, men serbisku myndugleikarnir hava umborið seg við, at teir vita ikki, hvar maðurin er. Sambært tíðindunum í B92 hevur Mladic ikki tikið pengar av pensjónini sjálvur, men skyldfólk hansara hava fulltrú frá honum til at taka pengar av kontuni, sigur B92.

Nú verður roknað við, at serbiska stjórnin fer at skipa eina nevnd, sum skal samskipa royndirnar at finna Ratko Mladic og aðrar serbar, sum eru eftirlýstir vegna krígsbrotsverk. Síðani Slobodan Milosevic varð útflýggjaður, hevur Serbia roynt at fáa limaskap í ES og NATO, men báðir felagsskapirnir hava svarað, at landið fær ikki limaskap, so leingi krígsbrotsmenn sum Ratko Mladic ikki eru tiknir og sendir til Haag.

Tey flestu halda, at Ratko Mladic fjalir seg í Serbia, og sambært B92 fær hann hjálp frá fyrrverandi starvsfeløgum í serbiska herinum.

## Smuglaðu hundahvølpar

Fronsku løgreglumenninir fingu ein hvøkk, tá teir nú um dagarnar steðgaðu einum lastbili, sum var komin úr Ungarn, tí í lastini funnu teir ikki færri enn 143 hundahvølpar.

Dominique Bussereau, landbúnaðarmálaráðharri, gav alt fyri eitt løgregluni boð um at seta hundahvølparnar í varðhald, so teir skulu ikki smitta aðrar hundar. Nú um dagarnar fingu hvølparnir vitjan, og gesturin var eingin annar enn fyrrverandi filmskvinnan Brigitte Bardot, ið er kend sum djóravinur burturav.

Brigitte Bardot hevur javnan gjørt vart við seg, tá tað hevur snúð seg sum djóravernd. Fyrr í hesum mánaðinum fanst hon at kanadisku myndugleikunum, tí teir loyva kópaveiði.

## Leyva stolin

Tær seinastu vikurnar hevur løgreglan í Gazageiranum leitað eftir einari kvennleyvu, sum fýra vápnaðir menn rændu úr einum djóragarði. Menninir tveittu eitt teppi oman yvir leyvuna og fóru avstað við henni og tveimum papageykum, sum duga at tosa arabiskt, sigur BBC.

Palestinsku myndugleikarnir hava einki sagt alment um burturflytingina, men nú hevur maðurin, sum eigur djóragarðin, almannakunngjørt, at hann er sinnaður at rinda finningarløn fyri tey trý djórini. Myndugleikarnir siga, at teir hava alla tíðina leitað eftir leyvuni og burturflytarunum, og sambært BBC eru teir vísir í, at leyvan og menninir eru í Gazageiranum enn.

Kvennleyvan, sum eitur Sabrina, búði í djóragarðinum saman við kallleyvuni Fakhra, og sambært eigaranum hevur hann verið púra frá sær sjálvum av sorg, síðani unnastan varð burturflutt.

Djóragarðurin í Gaza er nýggjur. Hann lat upp í oktober, eftir at ísraelsk flogfør bumbaðu tann gamla fyri einum ári síðani.